Tórshavn, tann 21. januar 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/22050-18
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina hjá Sunda kommunu av einari umbøn um innlit

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá Frihedsbrevet um málsviðgerðina hjá Sunda kommunu av einari umbøn um innlit. Sunda kommuna hevði sýtt fyri at veita innlit vísandi til kravið um eyðmerking í innlitslógini, og at tað ikki var gjørligt at leita fram skjalførdu upplýsingarnar, ið umbønin um innlit fevndi um. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera rætt at Sunda kommuna vísti til kravið um eyðmerking. Harafturat helt umboðsmaðurin, at umstøðurnar í málinum ikki vóru soleiðis, at kommunan kundi vísa á sína egnu skipan at skjalføra sum grundarlag fyri ikki at veita innlit. Sunda kommuna hevði kravt eitt undangjald fyri at veita innlit. Í kanning frá 2023 hevði umboðsmaðurin mint Sunda kommunu á, at undangjald einans kundi krevjast í serstøðum. Umboðsmaðurin gav samanumtikið Sunda kommunu eina átalu fyri avgreiðsluna av umbøn klagarans og fyri ikki at broyta sína mannagongd at krevja gjald, soleiðis sum umboðsmaðurin áður hevði mint kommununa á.*

## 2. Málslýsing

Við skrivi, dagfest 23. september 2024, sendi A, journalistur fyri Frihedsbrevet, soljóðandi klagu:

> “Til Løgtingsins Umboðsmann
>
> Eg, A, journalistur á Frihedsbrevet.fo, vil hervið kæra til Løgtingsins Umboðsmann um avgerð hjá Sunda kommunu um at nokta at veita alment innlit í sambandi við ein innlitsfyrispurning frá Frihedsbrevet.fo.
>
> **Málsgongd**
>
> 5. september 2024 søkti eg sum journalistur fyri Frihedsbrevet.fo um innlit í *“skjøl í sambandi við arbeiðir, sum feløgini ... hava gjørt fyri Sunda kommunu frá 2020 til 2024, harundir útbjóðingartilfar og rokningar”*.
>
> 9. september 2024 skrivaði Sunda kommuna aftur og spurdi, um “frá 2020 til 2024” í mínum fyrispurningi meintist við tilfar frá “1 jan 2020 til og við 31.12.2023”. Eg váttaði, at tað var rætt skilt.

12. september 2024 skrivaði Sunda kommuna tó aftur, at *"umsóknin er viðgjørd og er avgerð tikin um, ikki at ganga umsóknini á møti"*. Hetta skuldi vera grundað á §4 stk. 3 í innlitslógina. Sunda kommuna skrivaði, at *"umsóknir um innlit skulu vera nóg neyvt orðaðar til, at kommunan er før fyri at eyðmerkja mál, sum eru fevnd av umbønini"*.

**Kæra**

Eg vil kæra um hesa avgerðina.

Sunda kommuna sigur seg ikki kunna ganga umsóknini á møti, tí umsóknini er ikki nóg neyvt orðað. Men hetta, meti eg, heilt einfalt ikki vera rætt. Hetta verður nágreinað, *hvønn* talan er um ... og *nær* (frá 01.01.2020 til 31.12.2023).

Eg veit væl, at kommunur eru sjálvstøðugar eindir, men kommunur eru undirlagdar somu lógir, og eru fleiri líknandi fyrispurningar blivnir avgreiddir av øðrum kommunum uttan nakran trupulleika at eyðmerkja málini, sum eru fevnd av líknandi umbønini. Tað er lætt hjá kommunum at finna út av, hvussu nógvar uppgávur ein kommuna hevur keypt frá einum ávísum veitara eitt ávíst tíðarskeið.
..."

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 23. september 2024 varð klagan send Sunda kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi eina viku. Samstundis varð Sunda kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum umframt skjalayvirlit.

Tann 30. september 2024 sendi Sunda kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar, umframt avrit av skrivi til A, journalist, viðvíkjandi umbøn hansara um innlit:

"Sunda kommuna hevur tann 23.09.2024 móttikið skriv tykkara viðvíkjandi klagu frá A, journalisti, um avgerðina hjá Sunda kommunu um noktan av innliti.

...

Eftir at Løgtingsins Umboðsmaður sendi klaguna til viðmerkingar hjá kommununi, gjørdist kommunan varug við, at avgerðin tíverri ikki innihelt eina nóg fullfíggjaða grundgeving fyri júst hvat kommunan grundaði sína sýtan á. Hetta misstakið er nú rættað við hjálagda skrivi til viðkomandi. (*skrivið, ið Sunda kommuna sendi klagara tann 30. september 2024 stendur at lesa niðanfyri, mín viðm.)*

**Ad1) Frágreiðing um viðgerðina av hesum máli:**

Øll mál sum vera skrásett í journalskipanini hjá Sunda kommunu, eru skrásett á mál og ikki eftir hvør veitarin er til arbeiði. Tískil var ikki møguligt at finna ítøkilig mál útfrá umbønini.

Grundað á hetta, varð avgerð tikin um, ikki at ganga umsóknini á møti. Víst varð til § 4, stk. 3 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001 har tað stendur:
*Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við. Umsóknir um innlit skulu vera nóg neyvt orðaðar til, at kommunan er før fyri at eyðmerkja mál, sum eru fevnd av umbønini.*

**Ad2) Yvirlit yvir málini, ið talan snýr seg um, umframt skjalayvirlit fyri hvørt mál.**

Sí omanfyrinevndu frágreiðing."

Skrivið til A, journalist, ið Sunda kommuna sendi tann 30. september 2024, var soljóðandi:

> **“Viðvíkjandi umbøn tygara um innlit í skjøl og rokningar í sambandi við arbeiði hjá ... 2020-2024**
>
> *Soljóðandi svarskriv varð sent tygum tann 12.09.2024*
>
> *Sunda kommuna hevur tann 05.09.2024 móttikið teldupost tygara, har søkt verður um innlit í skjøl í sambandi við arbeiði sum hava gjørt fyri Sunda kommunu frá 2020 til 2024, harundir útbjóðingartilfar og rokningar.*
>
> *Umsóknin er viðgjørd og er avgerð tikin um, ikki at ganga umsóknini á møti.*
>
> *Avgerðin er grundað á § 4, stk. 3 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001 har tað stendur:*
> *Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við.*
>
> *Umsóknir um innlit skulu vera nóg neyvt orðaðar til, at kommunan er før fyri at eyðmerkja mál, sum eru fevnd av umbønini.*
>
> *Avgerðin er endalig innan fyrisitingina og kann ikki kærast.*
>
> *Møguleiki er at leggja málið fyri Føroya rætt ella klaga til Løgtingsins umboðsmann.*
>
> **Avgerðin hjá kommununi er klaga til Løgtingsins umboðsmann**
>
> Kommunan harmast um, at tygum ikki frá byrjan fingu eina fullfíggjaða grundgeving fyri avgerðini.
>
> Øll mál sum vera skrásett í journalskipanini hjá Sunda kommunu, eru skrásett á mál og ikki eftir hvør veitarin er til ávís arbeiði. Tað ber ikki til at finna ítøkiligt mál út frá umbønini og kommunan kann heldur ikki tryggja sær at umsøkjarin fær tey mál og skjøl, sum biðið verður um.
>
> Kommunan hevur viðgjørt umbønina av nýggjum og vil við hesum spyrja tygum, um til ber at senda eina nýggja innlitsumbøn, sum greinar nærri tey mál, talan er um.”

Tann 4. oktober 2024 sendi umboðsmaðurin Sunda kommunu soljóðandi fyrispurning:

> “...
>
> Vísandi til frágreiðing tykkara, har tit greiða frá, at tað ikki letur seg gera at geva umboðsmanninum eitt yvirlit yvir málini, tí at mál, skrásett í journalskipanini hjá Sunda kommunu, ikki vísa hvør veitarin er til ymsu arbeiðini.
>
> Umboðsmaðurin undrast á hetta svar og vil tí spyrja, um tað ikki letur seg gera í journalskipanini hjá Sunda kommunu at finna fram til mál, har nevndu virkir eru partar ella luttakarar?
>
> Sambært § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur fyrisitingin skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
>
> Umboðsmaðurin ynskir svar tykkara innan 14 dagar.
>
> ...”

Tann 15. oktober 2024 sendi Sunda kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar, umframt avrit av skjølum, ið innlit var latið klagaranum í:

> **“Viðvíkjandi klagu frá A journalisti, um noktan av innliti. Frágreiðingin frá Sunda kommunu.**
>
> Kommunan hevur tann 04.10.2024 móttikið skriv tykkara, har biðið verður um at geva umboðsmanninum yvirlit yvir málini.
>
> Sunda kommuna hevur tann 07.10.2024 móttikið nýggja umsókn frá A, har hann vísir á hvørji mál hann ynskir at fáa innlit í. Umsóknin verður send tykkum viðheft. (*Umsóknin er ikki endurgivin í hesum áliti, mín viðm.)*
>
> Umsóknin frá A dagf. 04.10.2024 er viðgjørd. Avgjørt er at ganga umsóknini á møti. Skriv er sent til A tann 14.10.2024. Skrivið verður sent tykkum viðheft. (*Skrivið er partvíst endurgivið niðanfyri, mín viðm.)*
>
> (*Sunda kommuna gevur í skrivinum eitt yvirlit yvir ymisk mál, ið klagarin ynskti innlit í. Hetta yvirlit er ikki endurgivið í álitinum)”*

Í skrivinum frá Sunda kommunu til A, journalist, dagfest 14. oktober 2024, greiddi kommunan frá, at umbønin um innlit varð gingin á møti og útgreinað varð, hvørji mál innlitið fevndi um, og hvørji skjøl og avrit talan var um. Harafturat stóð í skrivinum soleiðis at lesa um avgreiðsluna av umbønini um innlit:

> “...
> Skjølini eru klár til avgreiðslu.
> Samb. kunngerð frá 1993 er gjaldið:
> Fyri avrit ella fotoavrit av skjølum í einum máli, ið verða latin sambært lógini um innlit í fyrisitingina, krevur viðkomandi myndugleiki 20 kr. fyri fyrstu síðuna og 1 kr. fyri hvørja byrjaðu næstu síðu.
> Avritini eru tilsamans ... stk. **At gjalda kr. ...**
>
> Vinarliga flyti peningin á kontonr. ... Tá peningurin er fluttur verða skjølini send tygum í telduposti.
>
> Skjølini kunnu eisini gjaldast og heintast á kommunuskrivstovuni innan 14 dagar.
> ...*”*

Tann 17. oktober 2024 sendi umboðsmaðurin Sunda kommunu soljóðandi teldupost:

> **“Viðvíkjandi klagu, dagfest 23. september 2024**
>
> Tann 4. oktober 2024 setti umboðsmaðurin Sunda kommunu soljóðandi spurning:
>
> > “Vísandi til frágreiðing tykkara, har tit greiða frá, at tað ikki letur seg gera at geva umboðsmanninum eitt yvirlit yvir málini, tí at mál, skrásett í journalskipanini hjá Sunda kommunu, ikki vísa hvør veitarin er til ymsu arbeiðini.
> >
> > Umboðsmaðurin undrast á hetta svar og vil tí spyrja, um tað ikki letur seg gera í journalskipanini hjá Sunda kommunu at finna fram til mál, har nevndu virkir eru partar ella luttakarar?”
>
> Umboðsmaðurin ynskir, at Sunda kommuna greiðir umboðsmanninum frá hesum, við støði í viðgerðini av innlitsmálinum hjá klagaranum.

> Umboðsmaðurin ynskir eisini, at Sunda kommuna greiðir frá mannagongdini um journalisering. Um Sunda kommuna hevur eina niðurskrivaða mannagongd um journalisering, ynskir umboðsmaðurin avrit av hesari.
>
> Í skrivi frá Sunda kommunu til klagara, dagfest 14. oktober 2024, stendur, at kommunan krevur undangjald fyri avritini, ið síðani verða send klagaranum við teldupposti.
>
> Umboðsmaðurin ynskir, at Sunda kommuna greiðir frá, hví kommunan krevur undangjald.
>
> Svar tykkara skal verða umboðsmanninum í hendi, í seinasta lagi tann 31. oktober 2024."

Tann 28. oktober 2024 sendi Sunda kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> **"Viðvíkjandi klagu, dagfest 23. september 2023**
>
> Sunda kommuna hevur tann 17.10.2024 móttikið teldupost tykkara, har umboðsmaðurin ynskir, at kommunan greiðir umboðsmanninum frá niðanfyristandandi spurningi, við støði í viðgerðini av innlitsmálinum hjá klagaranum.
>
> ...
>
> Tá sagt verður, at tað ikki ber til at finna ítøkilig mál út frá umbønini, er frágreiðingin tann, at tá talan er um størri verkætlanir, vera hesar útveittar til ráðgevarar at umsita. Ráðgevararnir senda síðani skjølini til kommununa, og er tað teir sum standa sum avsendarar av skjølunum. Fakturar frá arbeiðstakara, vera ikki skrásettir í journalskipanini, men vera bókaðir í bókhaldsskipanini.
>
> Viðheft verður sent avrit av: Mannagongdir í samband við skráseting og málsavgreiðslu hjá journalini dagførdar 10.04.2024.
>
> Kommunan ásannar, at innlitsumbønin skuldu havt verið viðgjørd á annan hátt. Mannagongdin í sambandi við viðgerð av innlitsumbønum er endurskoðað soleiðis, at tílíkar støður ikki koma fyri aftur. Tað vil siga, at um mett verður, at innlitsumbønin ikki er nóg greið, setir kommunan seg í samband við umsøkjara, fyri at fáa greiðu á, hvørji mál talan er um.
>
> **Umboðsmaðurin ynskir, at Sunda kommuna greiðir frá, hví kommunan krevur undangjald.**
> Sunda kommuna hevur altíð kravt gjald fyri innlit sambært kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina.
>
> Mannagongdin at krevja undangjald fyri innlit, varð sett í verk fyri nøkrum árum síðani, hetta orsaka av, at tað ofta kom fyri, at tey sum høvdu fingið innlit, ikki rindaðu kostnaðin fyri innlitið.
>
> Tá talan er um at avgreiða innlitsmál, vera skjølini útskrivað og gjøgnumgingin. Skjølini kunnu avheintast á kommunuskrivstovnuni, ella sendast umvegis teldupost. Tá sent verður umvegis teldupost, vera skjølini innskannað sum pdf fílar og sendir umsøkjara.
>
> Mett hevur verið, at henda mannagongd er tann skjótasta og greiðasta, at avgreiða innlitsmál, tá kommunan ikki hevur innlitsmodul í sínari journalskipan.
>
> Vónandi svarar frágreiðingin spurningunum sum settir eru kommununi."

Saman við frágreiðingini sendi Sunda kommunu eisini skjal, seinast dagført 10. apríl 2024, ið greiðir frá mannagongd í sambandi við skráseting og málsavgreiðslu hjá Sunda kommunu. Hetta skjalið er ikki endurgivið í hesum áliti.

Tann 7. november 2024 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina hjá Sunda kommunu av umbøn klagarans um alment innlit, serliga við atliti at kravinum um eyðmerking og heimildini at krevja undangjald.

*Kravið um eyðmerking*
Í sambandi við umbøn klagarans um alment innlit, dagfest 5. september 2024, svaraði Sunda kommuna klagaranum, at umbønin ikki varð gingin á møti vísandi til § 4, stk. 3 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina.

§ 4, stk. 3 er soljóðandi:

> **§ 4** ...
> ...
> *Stk.3.* Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við

Í vegleiðing til innlitslógina (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993) "Vegleiðing um innlit í fyrisitingina" stendur soleiðis at lesa á s. 7 um § 4, stk. 3:

> "Sambært § 4, stk. 3 skal ein áheitan um skjalainnlit skila til tev skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at verða gjørdur kunnigur við. Ásetingin skal síggjast í sambandi við lógarinnar § 5, stk. 1, nr. 2, sambært hvørjari høvi til skjalainnlit m.a. fevnir um innføringar hjá myndugleikanum í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølunum í viðkomandi máli.
>
> Hereftir kann verða kravt, at tann, ið ynskir skjalainnlit undir øllum umstøðum hevur ein ávísan kunnleika til, at málið er til, áðrenn hann vendir sær til viðkomandi myndugleika. Umsitingin hevur sostatt ikki skyldu til at ganga eini áheitan á møti um at síggja øll mál av einum ávísum slag ella øll mál, ið eru journaliserað í einum ávísum tíðarskeiði. Í tann mun ein slík áheitan kemur frá fjølmiðlunum, eigur áheitanin tó vanliga at verða gingin á møti, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu o.tíl.
>
> Annars kann ikki verða lýst út í æsir hvussu greinilig tilskilanin av málinum ella skjølunum í tí einstaka førinum skal vera. Tað, ið skal verða kravt er, at áheitanin hevur slíkar upplýsingar, at tað, soleiðis sum journalir, skráir o.tíl. hjá viðkomandi myndugleika eru háttaðar, er gjørligt at finna fram til málið. Tilskilan av journalnummari á málinum er ikki neyðug, men heldur ikki altíð nóg mikið.
>
> Tað áliggur viðkomandi fyrisitingarmyndugleika at vegleiða almenningin um hvørjar upplýsingar, tað í tí einstaka førinum er neyðugt at fáa til vega fyri at ganga hesum krøvum á møti. Eisini skal dentur verða lagdur á ... at vanliga er einki til hindurs fyri, at viðkomandi myndugleiki, tá umstøðurnar annars tala fyri tí, sær burtur frá kravinum um, at áheitanin skal skila til eitt ávíst mál. (*Her verður sipað til meginregluna um meirinnlit, ið sigur, at tann einstaki fyrisitingarmyndugleikin, eftir egnari meting, kann loyva einum víðari skjalainnliti enn ásett er í lógini, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu o.tíl., mín viðm.)*"

Av hesum ber til at staðfesta, at hóast talan er um eitt krav um eyðmerking í innlitslógini í sambandi við umbønir um innlit, so eigur ein myndugleiki at ganga umbønum um innlit frá fjølmiðlum á møti, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu o.t. Vísast kann eisini til s 387-388 í "Betænkning om Offentlighedsloven, betænkning nr. 1510/2009", ið hevur samsvarandi lýsing av kravinum um eyðmerking, ið var galdandi í fyrrverandi donsku innlitslógini, ið er meinlíkt kravinum um eyðmerking, ið ásett er í § 4, stk. 3 í føroysku innlitslógini.

Eg haldi tískil, at tað ikki var rætt, tá Sunda kommuna í svari sínum, dagfest 12. september 2024, vísti til § 4, stk. 3 sum grundgeving fyri ikki at ganga umbøn klagarans um innlit á møti.

Í frágreiðing til mín, dagfest 30. september 2024, og í skrivi til klagaran, eisini dagfest 30. september 2024, vísir Sunda kommuna á sína egnu skipan at skjalføra upplýsingar sum partur av grundgevingini fyri, at umbønin um innlit ikki kundi gangast á møti. Soleiðis sum málið er lýst, dugi eg ikki at síggja, at Sunda kommuna í hesum føri kann nýta sína egnu skipan sum grundgeving fyri, at innlit ikki kann veitast. Hesa fatan grundi eg á, at sambært teimum upplýsingum, ið eg havi fingið frá Sunda kommunu, er talan um eitt rættiliga avmarkað tal av arbeiðstakarum og arbeiðstøkum, ið umbønin um innlit fevnir um. Harafturat gevi eg gætur, at Sunda kommuna eftirfylgjandi hóast alt var før fyri at veita klagaranum innlit í umbidnu upplýsingarnar.

Eg fari at minna Sunda kommuna á, at ein myndugleiki hevur skyldu til at skipa sínar arbeiðsgongdir og skipanir soleiðis, at innlit kann veitast samsvarandi ásetingunum í innlitslógini, undir hesum meginregluni um meirinnlit.

Eg gevi gætur, at Sunda kommuna í frágreiðing sínari til mín, dagfest 30. september 2024, eftir, at klagarin hevði klagað til mín, ásannaði, at umbønin um innlit frá klagaranum ikki var handfarin á rættan hátt, og at umbønin um innlit varð játtað klagaranum í skrivi, dagfest 14. oktober 2024, samsvarandi nýggju umbøn klagarans um innlit, dagfest 4. oktober 2024. Eg taki hetta til eftirtektar og geri ikki fleiri viðmerkingar til hendan partin av klagumálsviðgerðini.

*Heimildin at krevja undangjald*

Í skrivinum, ið klagarin fekk tann 14. oktober 2024, har umbønin um innlit varð játtað, var eisini eitt krav um, at klagarin skuldi rinda eitt undangjald fyri avritini.

Sunda kommuna vísti sum grundgeving fyri undangjaldinum á kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina.

Sambært § 1, stk. 1 í kunngerðini um gjald er ásett soleiðis: "Fyri avrit ella fotoavrit av skjølum í einum máli, ið verða latin sambært lógini um innlit í fyrisitingina, krevur viðkomandi myndugleiki 20 kr. fyri fyrstu síðuna og 1 kr. fyri hvørja byrjaða næstu síðu, jbr. tó §§ 2-3."

Í frágreiðing um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum, ið eg lat úr hondum tann 27. oktober 2023, var spurningurin um undangjald í sambandi við umbønir um alment innlit viðgjørdur. Sunda kommuna var ein av kommunum, ið viðgjørdar vórðu

í frágreiðingini, og summi av málunum hjá Sunda kommunu snúðu seg um, at kommuna hevði kravt undangjald í sambandi við umbønir um alment innlit.

Eg segði soleiðis um undangjald, á s. 14 í frágreiðingini:

> "Tá tað ofta er týdningarmikið fyri borgararnar og fjølmiðlarnar at fáa skjalainnlitið skjótt, er í § 16 í innlitslógini ásett, at viðkomandi myndugleiki skjótast gjørligt skal gera av, um áheitan um skjalainnlit kann verða gingin á møti. Er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur fingið hana, skal myndugleikin geva fráboðan um orsøkina til hetta og um, nær avgerð væntandi fer at verða tikin.
>
> At krevja gjald frammanundan at innlit verður veitt, kann, eftir míni metan, seinka avgreiðsluni av einum innlitsmáli. ...
> ...
>
> Hvat viðvíkur spurninginum um at krevja gjald, áðrenn innlitið verður givið, er tað mín fatan, at atlitið til skjóta viðgerð er meira avgerandi/týðandi, enn spurningurin um at hava eina smidliga og trygga gjaldskipan fyri innlit. Eg eri tí av tí fatan, at sum meginregla eigur gjald ikki at verða kravt áðrenn innlitið er givið, men at forútgjalding bert eigur at verða nýtt í eini serstøðu. Víst verður í hesum sambandi til niðurstøðuna hjá danska umboðsmanninum FOB nr. 1999.73 og til kap 22 pkt. 6 í offentlighedskomissionens betænkning frá Justitsministeriet nr. 1510/2009."

Í sambandi við viðgerðina av Sunda kommunu í frágreiðingini, gav eg Sunda kommunu m.a. soljóðandi viðmerkingar:

> "Hvat viðvíkur gjaldi fyri at veita innlit er tað mín meting, at gjald sum meginregla ikki eigur at vera kravt sum forútgjalding, m.a. tí hetta kann seinka innlitinum. Eg fari tí at mæla til, at kommunan broytir sínar mannagongdir fyri at krevja gjald, so forútgjalding bert verður kravd, tá ein serlig orsøk er til tað. ..."

Innlitslógin hevur sum endamál at stimbra opinleikan kring almennu fyrisitingina og tryggja eitt fólkaræðisligt eftirlit við virkseminum hjá myndugleikunum. Innlitslógin er á hesum grundarlagi eitt týðandi amboð hjá fjølmiðlum í arbeiði teirra at lýsa og greina viðurskifti av samfelagsligum týdningi.

Grundað á mínar viðmerkingar til Sunda kommunu í omanfyri nevndu frágreiðing, haldi eg tað vera atfinningarsamt, at Sunda kommuna ikki hevur broytt sínar mannagongdir og hevur hildið áfram at krevja undangjald í sambandi við avgreiðslur av umbønum um innlit. Eg síggi einki í hesum máli, ið talar fyri, at talan er um eina serstøðu, ið loyvir kommununi at krevja undangjald. At krevja undangjald sum fasta mannagongd samsvarar eftir mínari meting ikki við innlitslógina og endamálið við henni. Fyri fjølmiðlar og tíðarbæri í teirra arbeiði kann tað hava stóran týdning, um umbønir um innlit verða darvaðar óneyðugt.

Eg fari samanumtikið at geva Sunda kommunu eina átalu fyri avgreiðsluna av umbøn klagarans um innlit í hesum máli og fyri ikki at broyta mannagongdina at krevja gjald, soleiðis at undangjald einans verður kravt í einari serstøðu.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður